


*Nýggja Norðborg tekur seg væl út við bryggju í Chili. Ætlandi skuldi skipið tekniskan royndartúr fyri jól, men ymiskir trupulleikar stungu seg upp – og síðan komu jólini ímillum. Nú verður royndartúrurin væntandi í aðru viku*

um orsøkum, eitt nú í sambandi við sølu av okkara framleiðslu. Norðborg er eftirhondini vorðið eitt kent navn á marknaðinum, sigur hann.

## Skapar nógv

Kristian Martin vísir á, at tað nú eru átta ár, síðan Norðborg byrjaði at virka pelagisk fiskasløg umborð.

- Hetta hevur gingið rímiliga væl og hevur kastað væl av sær, bæði hjá skipi og manning, og eisini hevur hetta virksemið havt ringvirkningar við sær uppi á landi. Tímalønir liggja eisini eftir á landi, tá fiskurin verður landaður, frystur og aftur skal avskipast. Sjálvt teir, sum fáast við plattar, hava notið gott av hesum virksemi. Aftrat hesum kemur, at manningin umborð á Norðborg er tvífalt so stór, sum umborð á einum pelagiskum skipi, ið ikki hevur framleiðslu.

Kristian Martin minnist aftur á góðu tíðina, tá teir í eini tvey fylgjandi ár frystu lodnu úr Barentshavinum umborð á Norðborg.

- Vit høvdu japanesarar umborð, og væl fekst fyri vøruna í Japan. Nú vóna vit bara at fáa lut í uppgongdini, sum hevur verið í lodnustovninum í Barentshavinum. Vit vónaðu, at hetta fór at henda í samráðingum við russar og norðmenn hesaferð, men nú hetta ikki eydnaðist, vóna vit, at hetta verður í komandi ári.

Reiðarin sigur, at hóast svartkjaftakvotan er nógv skerd, eru tó onkrir glottar, og millum hesar eru vónirnar um at fáa lut í lodnuni í Barentshavinum, eins og í íslendskum sjógvi, har føroysk skip nú kunnu virka fiskin umborð og landa lodnu til matna.

- Okkara ynski er, at myndugleikarnir í Føroyum taka hædd fyri, at vit royna at menna og útbyggja okkum á einum øki sum ger, at vit kunnu fáa meira burtur úr okkara tilfeingi – eisini einum minkandi svartkjaftatilfeingi, sigur Kristian Martin Rasmussen.



*- Vit hava valt at kalla nýbygningin Norðborg, og hetta er partvís av praktiskum orsøkum, sigur reiðarin*